## Danir lumpaðu indiskar læknar

28 indiskir læknar, sum komu til Danmarkar at arbeiða í fjør, fingu als ikki tað, sum teir lokalu sjúkrahúsmyndugleikarnir í Miðjyllandi høvdu lovað teimum. Berlingske Tidende skrivar, at indisku læknarnir fingu lyfti um 60.000 krónur í løn um mánaðin og 25 prosent í skatti. Men tá saman um kom, fingu læknarnir 42.500 krónur í løn um mánaðin, og skatturin reyk upp á 40 prosent og seinni heilt upp á 60 prosent, skrivar blaðið. Úrslitið er millum annað, at læknarnir hava sett seg í størri skuld, enn teir annars høvdu gjørt.



## Nú koma fleiri ellis-og røktarheimspláss

Landsstýriskvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen, hevur fingið undirtøku frá landsstýrinum til at hækka stuðulin til bygging av ellis- og røktarheimum úr 500 túsund í 800 túsund krónur fyri hvørt búpláss. Eisini verður stuðulin til sambýlir hækkaður. Sagt verður, at tørvurin á røktarheimum er sera stórur, og at neyðugt at seta fer á byggingina av búplássum alt fyri eitt. Tað eru kommunurnar, sum vara av byggingini av ellis- og røktarheimum, meðan landið letur stuðul til byggingina. Í løtuni eru tríggjar verkætlanir í gongd til íalt 72 pláss.

# Kríggj ímillum fakfeløg um starvsfólk Kringvarpinum

**Felagið fyri miðlafólk heitir nú staðiliga á starvsfólkið í Kringvarpinum um at melda seg úr Starvsmannafelagnum**

KRINGVARP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta má vera eindømi í føroyskari fakfelagssøgu.

Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum, er rættiliga illa við av eini almennari áheitan frá fakfelagnum hjá føroyskum miðlafólkum.

Í eini almennari áheitan um vikuskiftið mælti felagið Føroysk Miðlafólk staðiliga á øll starvsfólk í Kringvarpinum, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, um melda seg úr Starvsmannafelagnum.

Bæði Starvsmannafelagið og felagið Føroysk Miðlafólk, hava mótmælt ætlaðu uppsøgnunum í Kringvarpinum.

Men harafturat hevur Starvsmannafelagið eisini mótmælt, at Kringvarpið nú á nýggjárinum hevur sett journalist í starv og tað er her, at ketan hjá Miðlafelagnum loypir av.

At nýggjur journalistur er settur hevur als onki við uppsagnirnar at gera, sigur Miðlafelagið.

Felagið sigur, at tað var neyðugt at seta nýggjan journalist fyri ein, sum hevði sagt upp í november og starvið varð lýst leyst langt áðrenn uppsagnirnar komu upp á tal.

Tí mótmælir felagið Føroysk Miðlafólk harðliga, at hesi bæði málini verða tengd saman og tá ið Starvsmannafelagið ger tað er endamálið ikki annað enn at grugga málið við vilja.

Felagið Føroysk Miðlafólk sigur, at hetta strika undir, at Starvsmannafelagið ikki veit, hvussu eitt journalistiskt arbeiðspláss virkar.

Tí heitir felagið staðiliga á allar journalistar, sum eru limir í Starvsmannafelagnum um at melda seg úr, so at teir bara eru limir í felagnum Føroysk Miðlafólk.



*Í morgun var manningin í Kringvarpinum á fundi við Starvsmannafelagið um støðuna, nú stríðið um starvssetanir og uppsagnir í Kringvarpinum alsamt harðnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Selma harmast

Selma Ellingsgaard harmast um, at hetta skal vera endað sum eitt stríð ímillum tvey fakfeløg.

- Okkara einasta áhugamál er at røkja áhugamálini hjá okkara limum og vit hava ikki gjørt annað enn tað, sum áliggur einum og hvørjum fakfelag at gera fyri at verja rættindini hjá okkara limum.

- Fyri okkum er málið rættiliga einfalt og tað er, at sjey av okkara limum standa við einum ætlanarskrivi um uppsøgn og sum fakfelag hava vit skyldu til at gera, tað vit kunnu at forða fyri, at limir okkara missa starvið.

Tí harmast hon nú um at felagið Føroysk Miðlafólk eftir hennara tykki nú hevur snarað málið so at tað nú er blivið til eitt stríð ímillum tvey fakfeløg.

– Tað er ræðuliga óheppið at hetta nú verður gjørt til eitt stríð ímillum tvey fakfeløg og eg leggi dent á, at ongin í felagnum Føroysk Miðlafólk hevur vent sær til Starvsmannafelagið yvirhøvur at viðgera málið.

### Svárt at síggja

Selma Ellingsgaard sigur, at tað er eitt álvarsmál, tá ið felagið Føroysk Miðlafólk beinleiðis mælir journalistum og myndafólkum at melda seg úr Starvsmannafelagnum.

- Eg ivist í um hetta nakrantíð er komið fyri fyrr og hetta er eitt ómetaliga stórt vónbrot. Hetta er svárt at síggja, tí eg helt, at endamálið hjá fakfeløgum var at standa saman um at verja rættindini hjá løntakarunum og til henda áheitanin kom, hava vit bara sæð hetta sum eitt prinsippmál hjá einum fakfelag og ikki sum eitt stríð ímillum tvey fakfeløg, sigur Selma Ellingsgaard.

Hon staðfestir eisini, at sum støðan er nú, eru starvsfólk hjá tí almenna í okkara lítla landi limir í yvir 30 fakfeløgum.

- Vit halda, at vit áttu at roynt at savna og samstarva heldur at spjatt kreftirnar enn meiri.

Felagið føroysk Miðlafólk heldur, at tykkara framferð er tekin um, at tit skilja ikki journalistiska fakið.

- Fyri okkum er hetta eitt fakfelagsmál og onki annað. Vit hava størstu virðing fyri journalistiska fakinum. Eg skal vera tann fyrsta at viðganga, at Starvsmannafelagið er stórt og umfatandi, men tað eru so nógv serlig øki umboðað í felagnum, tí tað eru nógv fak, sum eru serlig.

# Vit verja okkara limir til tað síðsta

**- Vit ætla at gera tað, vit kunnu fyri at forða fyri at okkara limir í Kringvarpinum verða kastibløkur í einum stríði, sum tey eru púra ósek í, sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum**

KRINGVARPIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað eru ikki vit, sum hava gjørt ósemjuna um starvsfólkið í Kringvarpinum til eitt stríð ímillum tvey fakfeløg.

Tað staðfestir Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í felagnum Føroysk Miðlafólk.

Hon sigur tvørtur ímóti at tað hevur Starvsmannafelagið skyldina í.

Forkvinnan í Miðlafelagnum sigur, at tað, sum Starvsmannafelagið hevur gjørt, er illa umhugsað, tí felagið krevur nú, at ein væl limur í Miðlafelagnum, sum fult lógliga hevur søkt og fingið starv í Kringvarpinum, nú skal missa tað aftur, hóast hann er væl skikkaður til starvið.

Talan er um ein journalist, sum skal byrja í Kringvarpinum 1. februar.

– Tá ið Starvsmannafelagið setti hetta kravið fram og blandaði starvssetanina og uppsagnirnar saman, gjørdi felagið tað samstundis til eitt stríð ímillum tvey fakfeløg.

Hon endurtekur, at Miðlafelagið fer undir ongum umstøðum at góðtaka, at ein limur í felagnum skal missa eitt starv, hann er settur í.

Men hvørji stig felagið fer at taka, fær hon ikki sagt nakað um enn.

– Hendir tað, at hann missur starvið aftur, er ein nýggj støða, sum vit taka til viðgerðar, tá ið trupulleikin er íkomin. Hendir tað, fara vit at viðgera, saman við løgfrøðingi, hvørjar møguleikar vit hava, men tað skal ongin ivi vera um, at vit stuðla okkara limi til tað síðsta og vit fara at gera, tað, vit kunnu, fyri at verja hansara áhugamál.

### Hava mótmælt harðliga

Anna V. Ellingsgaard sigur, at tekur ein nýggj støða seg upp, fer Miðlafelagið at taka støðu til, hvat er mest ráðiligt at gera, so at ikki fleiri fólk í Kringvarpinum verða kastibløkur í einum spæli, sum tey annars eru púra ósek í.

*Men tað, sum Starvsmannafelagið førir fram, er, at Kringvarpið kundi latið vera við at sett starvið fyri á tann hátt at sloppið undan uppsagnum?*

– Tað er ein spurningur, sum leiðslan á Kringvarpinum má svara fyri. Vit hava harðliga mótmælt uppsagnunum og tað standa vit við. Men vit standa eisini við okkara stuðul til ein av okkara limum, sum fult lógliga hevur søkt og fingið eitt starv.

*Í Starvsmannafelagum eru tey vónsvikin av, at Miðlafelagið beinleiðis heitir á journalistar og fotografar í Kringvarpinum um at melda seg úr Starvsmannafelagnum.*

– Tað er eitt gamalt mál, tí Miðlafelagið hevur leingi roynt at savna øll fjølmiðlafólk í landinum í eitt felag fyri fjølmiðlafólk burtur av.

– Vit standa fast við, at journalistiska fakið er nakað serligt, tí tað er ein spurningur um at vera óheftur og tað kann verða ein trupulleiki, tá ið journalistar eru limir í fakfelagnum.

- Journalistar skulu ikki vera tengdir at øllum møguligum áhugamálum. Skal ein journalistur viðgera Starvsmannafelagið kritisk, slepst ikki undan, at tað er ein trupulleiki, tá ið hann sjálvur er limur í felagnum.